


*Við einum SpeedReading skeiði kanst tú økja munandi um tín lesiskjótleika*

# Nú kanst tú læra skjótlesing

**LESING** Seinast í mánaðinum verða tvey skeið í skjótlesing, og tað ber lættliga til at tvífalda lesingina

Leo Poulsen

Tað er felagsskapurin Henley, sum skipar fyri hesum skeiðunum, sum danin Leif Bergman fer at halda.

Leif Bergman er ummælari á Politiken, og við serliga teknikkinum, sum skjótlesing gevur, megnar hann at lesa 1800 orð um minuttin. Vanlig fólk lesa millum 150 og 200 orð um minuttin.

Leif Bergman er umboð fyri enska felagið Henley, sum er ein non-profit lærustovnur. Nakrir føroyingar taka í løtuni eina MBA-útbúgving, sum inniber, at teir í nøkrum umførum mugu til Onglands í skúla. Arbeitt verður fyri at seta ein flokk á stovn í Føroyum.

Tað er Jákup Bech Jensen, sum er umboðsmaður fyri Henley í Føroyum, og tað er eisini hann, ið hevur fingið Leif Bergman til Føroya at halda hesi skeiðini í Speed-Reading, sum er altjóða navnið á lesiteknikkinum.

Upprunaliga var tað undir fyrra verðaldarbardaga, at flogskiprarnir høvdu ilt við at kenna flogførini at. Teir vórðu tí vandir upp í einum undirvísingarhøli at kenna mun á flogførunum. Hetta var gjørt við myndum, og sum undirvísingin leið, gjørdust myndirnar minni og minni, og tíðin styttri og styttri, til flogskipararnir at enda upp á ein fimtapart av einum sekundi kundu kenna øll flogførini.

Og tá hetta bar til við flogførum, hví so ikki eisini við lesing. Soleiðis skaptist hesin serligi lesiteknikkurin, sum kemur ómetaliga væl við hjá teimum, sum skulu inntaka eina rúgvu av informatiónum gjøgnum lesnað.

Talan verður um tvey skeið, og aðrastaðni í blaðnum sæst, hvussu tú kanst melda teg til og somuleiðis nær og hvar skeiðini verða.

leo@sosialurin.fo


## Næmingur

- søkt verður eftir næmingi til bókhaldið



sansir.fo

Kundi tú hugsað tær lærupláss í einari fyritøku, har nógv er at gera, og har tú ert partur av einum starvsfólkatoymi, ið støðugt strembar eftir at mennast og gerast betri?

Vit leita eftir ágrýtnum og dugnaligum næmingi til bókhaldið at byrja 1. august 2010 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**
Tú hevur lokið studentsprógv, HF, HH ella líknandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og mennandi lærupláss í einum umhvørvi, har tað snýr seg um at veita eina góða tænastu.

Eru spurningar, ber til at ringja til Óla Reinert, telefon 360128.

Send tína umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 7. juni 2010 til:

P/F Poul Hansen
Postsmoga 3016
FO-110 Tórshavn
Merk brævbjálvan:
"Næmingur"

P/f Poul Hansen er størsta heilsøla í Føroyum. Umleið 75 fólk starvast í samtakinum, sum varð stovnað í 1927. P/f Poul Hansen umboðar sterk og dygdargóð vørumerki, og umleið 6500 ymisk sløg eru í vøruskránni.

PH
P/f Poul Hansen Heilsøla